**UTTAN ÚR HEIMI**

## 91 deyð í kulda

Russisku heilsumyndugleikarnir siga, at higartil í vetur eru 91 fólk í høvuðsstaðnum Moskva deyð í kulda.

Um vikuskiftið doyðu seks fólk, og umleið 40 onnur vórðu løgd inn á sjúkrahús, tí tey vóru illa á holdum komin av kulda.

Í fjør doyðu 399 fólk í Moskva av kulda, og tað er tað mesta nakrantíð í eitt ár. Sambært myndugleikunum eru tað yvirhøvur heimleys og rúsdrekkamisnnýtarar, sum doyggja, tá kuldin kemur um veturin.

## Færri fremmandafólk

Talið á teimum, sum koma til Danmarkar at leita sær friðskjól, minkar støðugt, og higartil í ár eru tey heili 71 prosent færri enn um somu tíð í fjør.

Tann borgarliga danska stjórnin hevur havt sítt eitt av sínum høvuðsmálum at avmarka streymin av fremmandafólki til Danmarkar, og hesin politikkurin hevur víst seg at eydnast sera væl.

Ráðharrin í innflytaramálum, Bertel Haarder, segði í gjár, at stjórnin hevur rokkið tí málinum, sum hon setti sær. Hann legði afturat, at nú talið á innflytarum er so nógv minkað, fer stjórin at taka stig til at fáa tey, sum hava fingið uppihaldsloyvi, limað inn í tað danska samfelagið. Danski Fólkaflokkurin, sum er stuðulsflokkur hjá borgarligu minnilutastjórnini, hevur sagt, at hann er eisini til reiðar at taka undir við hesum politikkinum.

## Tók nógvan heilivág

Fyrrverandi amerikanski forsetin, John F. Kennedy, tók nógvan heilivág hvønn einasta dag, tí hann leið av støðugari pínu og hevði harafturat aðrar heilsutrupulleikar.

Hetta kemur fram í einari nýggjari bók um Kennedy, sum søgufrøðingurin Robert Dallek er í ferð við at skriva. Í sínum arbeiði at skriva bókina hevur Robert Dallek fingið atgongd til skjøl, sum ikki hava verið alment kend fyrr. Har sæst, at Kennedy tók átta sløg av ymsum heilivági hvønn dag. Talan var m.a. um pínulinnandi tablettir, tablettir ímóti sinnistyngd og tablettir ímóti svøvnloysi.

Tað var alment kent, at Kennedy hevði ringan rygg, og at hann javnan leið av pínu í rygginum. Aftan á deyða hansara í 1963 kom fram, at hann eisini hevði havt aðrar trupulleikar við heilsuni. Sambært Robert Dallek leið hann m. a. av teirri lívshættisligu sjúkuni Addisons.

## Ali í Afghanistan

Fyrrverandi heilsmeistarin í nevaleiki, Muhammad Ali, kom sunnudagin til Afghanistan eftir innbjóðing frá ST.

Endamálið við ferðini er at økja áhugan fyri arbeiðinum at endurbyggja tað krígsherjaða landið. Á vitjanini er Muhammad Ali gestur hjá afghanska forsetanum, Hamid Karzai, og hann skal m. a. vitja ein gentuskúla, eitt kvinnubakarí, og so skal hann sjálvandi eisini hitta afghansk ítróttafólk.

Fyrrverandi nevnaleikarin hevur í mong ár hava stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum av ymsum slagi. Hann sýtti fyri at gera hertænastu í Vietnam, og tá hann í 1974 boksaði ein av sínum týdningarmestu dystum í afrikanska landinum Zaire, var tað júst við tí endamáli at fáa heimin at geva viðurskiftunum í Afrika størri ans. Í Afghanistan er hann eisini sera væl umtóktur.

# Miseydnað flogránið skal kannast út í æsir




*Turkiskir trygdarmenn uttan fyri ísraelska flogfarið í floghavnini í Istanbul*
*Mynd: Reuters*

**Ísraelsku myndugleikarnir hava sett í verk eina umfatandi kanning, sum skal staðfesta, hvussu tað eydnaðist einum manni at sleppa við einum av flogførunum hjá El-Al við knívi**

FLOGRÁNSKANNING
*Árni Joensen*

Tann 23 ára gamli ísraelski ríkisborgarin Tawfik Fukara tók knívin úr lummanum, stutt áðrenn flogfarið hjá El-Al skuldi seta seg í Istanbul. Hann hótti eina flogternu og royndi at sleppa inn í stýrihúsið, men so langt kom hann ongantíð. Teir báðir trygdarmenninir, sum vóru í flogfarinum, lupu á mannin og løgdu hann í hondjørn.

Flogfar nr. 581 hjá El-Al hevði 170 ferðafólk um borð, og flogskiparin boðaði eftirlitinum í Istanbul frá, at ein yvirgangstilburður hevði verið umborð. Turkiska løgreglan møtti mannsterk á flogvøllinum, og tann handtikni varð latin løgregluni, so skjótt flogfarið hevði sett seg. Sambært ísraelskum fjølmiðlum skuldi maðurin seinni latast ísraelsku myndugleikunum.

### Strangt eftirlit

Hví Tawfik Fukara ætlaði at ræna flogfarið, var ikki greitt í gjár, men tað at tað eydnaðist einum vápnaðum manni at sleppa við einum ísraelskum ferðamannaflogfari vakti stóran ans í Ísrael.

EL-Al verður mett sum heimsins tryggasta flogfelag, og vápnaðir trygdarmenn eru altíð við flogførunum hjá felagnum. Flogfarið kom úr Ben Gurion-floghavnini í Tel Aviv, sum vanliga verður mett at hava heimsins besta trygdareftirlit, bæði hvat viðvíkir ferðafólkinum og viðførinum. Meðan ferðafólk aðrastaðni kunnu koma ein hálvan tíma undan fráferð, noyðast fólk vanliga at koma tríggjar tímar undan fráferð í Ben Gurion-floghavnini.

At tað kortini eydnaðist einum manni at sleppa inn í flogfarið við knívi hevur tí loypt ótta á nógv fólk í Ísrael, og myndugleikarnir hava tí givið boð um at kanna tilburðin gjølla.

### Ikki síðani 1968

Seinast eitt flogfar hjá El-Al varð rænt var í 1968, tá tríggir limir í hernaðarliga palestinska felagsskapinum PFLP rændu eitt flogfar hjá felagnum. Flogfarið var á veg úrt Rom til Tel Aviv, men varð noytt at flúgva til Algeria. Í 39 samdøgur sótu 12 ísraelsk ferðafólk gíslar, til ísraelsku myndugleikarnir gingu við til at lata 15 palestinar fangar leysar í býti við gíslarnar.

Al-Al hevur kortini verið fyri álopum nakrar ferðir síðani. Í 1972 skutu tríggir limir í japanska yvirgangsfelagsskapinum Reyða Herinum 26 fólk og særdu 76 onnur á flogvøllinum í Tel Aviv. Trettan ár seinni, í 1985, myrdu limir í felagsskapinum hjá yvirgangsmanninum Abu Nidal 19 fólk, tá teir lupu á avgreiðslurnar hjá El-Al í Rom og Wien.

# Fyrrverandi stjórnarleiðari fekk 24 ára fongsul

**Fyrrverandi italski forsætisráðharrin, Giulio Andreotti, er dømdur 24 ára fongsul fyri at hava verið uppií, tá ein tíðindamaður varð myrdur í 1979**

ITALIA
*Árni Joensen*

Tann 83 ára gamli Giulio Andreotti hevur verið forsætisráðharri í Italia ikki færri enn sjey ferðir í árunum frá 1972 til 1992. Harafturat hevði hann lívslanga støðu sum senatorur.

Men hetta hjálpti honum ikki sunnudagin, tá rætturin dømdi hann sekan í at hava verið uppií, tá tíðindamaðurin Mino Pecorelli varð myrdur í 1979. Orsøkin til morðið var sambært ákæruvaldinum og dóminum, at Pecorelli hevði í umbúna at skriva eina bók, hvørs innihald fór at gera enda á politiska lívinum hjá Andreotti.

Hetta málið var fyri í einum øðrum rætti fyri trimum árum síðani, og tá varð Giulio Andeotti fríkendur. Ákæruvaldið legði alt fyri eitt dómin fyri hægri rætt, og har varð gamli politikarin sunnudagin dømdur sekur.

Sjálvur sigur Andreotti seg vera ósekan, og verjar hansara hava sagt, at teir fara at leggja málið fyri ovasta rættarmyndugleikan í Italia.

Núverandi italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, stuðlar Andreotti. Aftan á dómin segði Berlusconi, at dómurin sunnudagin var politiskur. Hetta er ikki fyrstu ferð, at forsætisráðharrin hevur lagt seg út í avgerðir hjá dómsvaldinum.

# ítróttur

Nr. 222 • týsdagur • 19. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

StÍF-Tjaldur 24-25 (14-15):

# Sensatión á Skála



*Fullkomuliga óvæntað tók Tjaldur bæði stigini við sær, tá teir sunnudagin vitjaðu á Skála, og soleiðis var størsta hondbóltssensatiónin higartil í ár veruleiki*

**Fullkomuliga óvæntað vann annasr stigaleysa Tjaldur útidystin móti oddaliðnum, StÍF, og settu teir sostatt ein tjúkka striku undir, at kappingin í ár er opnari enn nakran tíð áður**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í leygardagsútgávu okkara skrivaðu vit, at hóast tað júst var á Skála, at Tjaldur í fjør fekk vent skeivu gongdini, so var ein endurtøka av hesum ikki beinleiðis væntandi. Hvussu var og ikki, so løgdu runavíkingar vertin á hetta, tá teir ferðaðust tvørtur um fjørðin sunnudagin.

Tjaldur vann nevnliga dystin við einum máli, og skaptu harvið størstu hondbóltssensatiónina higartil á árinum.

### Fingu ikki tak á

Í slíkum dystum er største vandin hjá einum oddaliði helst, at teir kunnu undirmeta mótstøðuna, og ikki minst er hetta galdandi, tá talan er um lokaluppgerðir.

Av Skála verður eisini sagt, at hetta kanska partvíst var orsøkin til vánaliga úrslitið.

- Tað var snøgt sagt einki, sum riggaði, sum tað skuldi, hjá okkum. Vit skutu alt ov fá mál í mun til tað, sum møguleikarniar vóru til, og so vóru vit ikki nóg sterkir í verjuni, heldur liðskiparin hjá StÍF, Jón Rasmussen.

- Sjálvandi skal eg ikki taka nakað frá Tjaldrinum, tí teir spældu so sanniliga fyri sínum møguleika. Málverjin stóð ein góðan dyst, men tað sum gav okkum størstu trupulleikarnar mundi helst vera Jens Martin Knudsen. Hann gjørdi snøgt sagt tað, sum honum lysti, og fært tú ikki fatur á einum slíkum leikara, so kann tað ganga galið, heldur Jón, áðrenn hann leggur afturat, at um hetta verður lagið mikukvøldið móti VÍF, so verður talan um sorl.

### Í evstu løtu

Og at runavíkingar veruliga stríddust fyri sínum møguleika, er einki at ivast í. Allan dystin hildu teir eitt fast tak á strandingunum, sum hóast teir royndu, ongna tíð megnaðu at skræða seg leysar frá mótstøðuni. Tvørtur ímóti gjørdist tað í seinna hálvleiki, at strandingar royndu at vinna seg innaftur á runavíkingarnar, sum tó alla tíðina megnaðu at svara aftur.

Í seinasta minuttinum tóktist tað tó, sum um heimaliðið kortini skuldi fáa ein javnleik burtur úr royndunum, tá Alexandur Johansen skeyt teir upp á javnt, men í evstu løtu eynaðist Tórhalli Thomsen við hansara einasta máli í dystinum at skjóta sigurin og stigini tvørtur um kommunala fjørðin.

Hóast sigurin, so er Tjaldur framvegis niðasta liðið í deildini. Men tað skerst ikki burtur, at hetta er nakað, sum fløvar um vónirnar fyri eini endurtøku av árinum í fjør, har liðið sum frá leið stríddi seg alt meira upp eftir stigatalvuni. Mikudagin skulu teir á heimavølli royna seg móti Kyndli, og spyrst eitt líkinda úrslit burtur úr teirri uppgerðini, so er lítið at ivast í, at hondbóltsfepurin av álvara fer at tendra í Runavíkini.

Strandingar skulu tá til Vestmanna at spæla toppdyst, og sum vera man, so var hetta ikki nakað serligt útgangsstøði at vinna sær undan teirri ferðini. Hinvegin kann hetta eisini viðvirka til at seta leikar-arnar eyka upp til ta uppgávuna, og tað er so avgjørt nakað, sum liðið hevur tørv á, skal tað vera hugsingur um at gera nakað sum helst við vælsmurdu VÍF-maskinuna.

### Dysturin í tølum

**StÍF-Tjaldur 24-25 (14-15)**

Málskjúttar:

StÍF: Sveinur Justinussen 6(2), Alexandur Johanen 4(1), André F. Danielsen 4, Costin Dumitrescu 3, Kristjan Petursson 2, Artur Johansen 2, Bent Djurhuus 1, Jón Rasmussen 1, Janus Trúgvason 1

Tjaldur: Dragisa Stojovic 10, Jens Martin Knudsen 4, Áki L. Haansen 3, Zoran Sarcevic 2(1), Arnfinn Langgaard 2, Uni Højgaard 2, Sverri Justinussen 1, Tórhallur Thomsen 1

Brotskøst: StÍF 6, Tjaldur 3

Útvísingar: StÍF 4, Tjaldur 1

Dómarar úr Neistanum: Sámal Hansen & Kristian Johansen